## Andrew framvegis skaddur

Føroyski álopsspælarin var ikki við á liðnum hjá Fremad Amager, sum í gjár vann 3-0 ímóti Kolding á útivølli. Andrew var als ikki við í hópinum til dystin í Kolding, og orsøkin til tað var, at hann er skaddur. Tað gekk strúkandi hjá Fremad Amager, sum vann ein sera góðan sigur á útivølli. Fremad Amager liggur nú sum nummar 6 í donsku 1. deild.



## Rógvi í brennideplinum

Tað hevur hilnaðist væl í gjár og fyrradagin hjá teimum báðum føroyingunum í íslendskum fótbólti.

Fyrradagin vann Keflavík 2-1 á heimavølli móti Víkingi. Sigursmálið fingu teir í evstu løtu. Símun Samuelsen var alla tíðina í álopinum hjá Keflavík. Í gjár vann KR 2-1 í Akranesi. Rógvi Jacobsen var alla tíðina í KR álopinum. Rógvi legði upp til 1-0 málið, tá ið 20 minuttir vóru farnir. Tríggjar minuttir fyri leiklok, tá ið støðan var 2-1 til KR, var Rógvi aftur í brennideplinum. Tá varð ÍA málverjin rikin av vølli fyri at hava sligið Rógva Jacobsen.

# Føroyar tapti ímóti Hollandi

**Sum væntað høvdu føroyingar trupulleikar ímóti hollendsku stórmeistarunum í 1. umfari í talvolympiaduni. Úrslitið varð 4-0 til Holland**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Vónirnar um eitt gott føroyskt úrslit eru bjartar. Liðið verður mett at vera eitt hitt sterkasta nakrantíð, hóast eitt nú Heini Olsen vantar á liðnum. Talvolympiadan verður telvað í Torino í Italia.

Føroyska landsliðið er soleiðis mannað. 1. John Arni Nilssen 2. Martin Poulsen 3. John Rødgaard 4. Helgi Dam Ziska og 5. borð og eykamaður er Hans Kristian Simonsen.




*Veselin Topalov endurvann krútsterku Mtel Masters. Eftir seks tey fyrstu talvini hevði hann annars bert 2,5 stig, men fýra sigrar á rað fluttu hann í toppin av talvuni*

### Eingin Sokolov

Spennandi var at síggja, hvussu hollendarar fóru at manna sítt lið, tá ið paringin til 1. umfar varð kunngjørd. Sterka stórmeistaraliðið hevur nevniliga gamla føroyavinin Ivan Sokolov á 1. borði. Teir valdu at spara sterka trumfin til sterkari mótstøðu og John Arni hitti tí Sergei Tiviakov (2669).

John R. og serliga Helgi høvdu møguleikar til okkurt stigið í dystinum. Helgi hevði betri støðu ímóti GM L´Ami, tá ið hann sum skilst tapti uppá tíð. John hevði leingi tamarhald á Van den Doel (2579), men fór út í eitt verri endatalv og tapti. John Arni varð spakuliga kroystur, meðan Martin leikti skeivt tíðliga og tapti eftir einans 18 leikir ímóti Nijboer (2584).Tískil eitt greitt tap ímóti nógv sterkari mótstøðu.

Føroyar hitta sum oftast sera sterk lið í 1. umfari, og mangan hava føroyingar fingið stig, men soleiðis varð ikki á hesum sinni.

### 2. umfar

Liechtenstein verður mótstøðulið føroyinga í 2. umfari. Liechtenstein er styrkismett nr. 116 í mun til føroysku styrkismetingina, sum er nr. 80 av 152 londum. Góð útlit eru tí fyri einum sigri til okkara menn mánadagin 22. mei.

### Topalov enn einaferð

Heimsmeistarin úr Bulgaria endurvann Mtel Masters, sum varð telvað í Sofia. Eins og í fjør varð tað ein øgiligur endaspurtur, sum gav Veselin Topalov 1. pláss í hesari krútsterku kapping.

Tað var annars afturvendi Gata Kamsky úr USA, sum legði bragdliga út og hevði leiðsluna áðrenn seinasta umfar. Í næstseinasta umfari fekk Topalov Kamsky aftur, tá ið hann vann ruddiliga við svarta fólkinum á amerikanska stórmeistaranum. Kamsky, ið var lægst rataður, hevði eina framúr kapping og hevði størstu ratingframgongdina.

Topalov vann fýra síni seinastu talv og fekk loksins 6,5 stig av 10 møguligum. Kamsky varð nr. 2, meðan Viswanathan Anand varð tann triðji í røðini.

**Endaliga støðan í Mtel Masters**

1. Topalov, Veselin BUL 2804 6.5/10
2. Kamsky, Gata USA 2671 6.0
3. Anand, Viswanathan IND 2803 5.5
4. Svidler, Peter g RUS 2743 5.0
5. Bacrot, Etienne g FRA 2708 3.5
6. Ponomariov, Ruslan g UKR 2738 3.5



## Talvið hesa vikuna

**Kamsky,G (2671) - Topalov,V (2804)**
Mtel Masters (9), 20.05.2006

**1.e4 c5 2.Rif3 d6 3.d4 cxd4 4.Rixd4 Rif6 5.Ric3 a6** (Tá svartur vil vinna, er Naidorfvarianturin í sisilionskum eitt framúr vápn, serliga tá ein dugir byrjanina eins gott sum Topalov...) **6.Bg5 e6 7.f4 Fb6 8.Rib3 Be7 9.Ff3 Ribd7 10.0–0–0 Fc7 11.Bd3 b5 12.Rhe1 Bb7 13.Fh3 b4 14.Rib1 e5!** (Passiviserar bispin á d3 og búrar somuleiðis b3-riddaran enn meira inni) **15.Ri1d2 a5 16.Kb1 a4 17.Ric1 0–0!** (Eingin vandi er á ferð kongamegin, og Topalov fær nú rókin við í spæl) **18.Rie2 Rfc8 19.Rig3 g6 20.Ric4 Ba6 21.b3 axb3 22.cxb3 Ric5** (Svartur hevur greiðan fyrimun við sínari góðu og risikofríu álopsstøðu) **23.Rie2 Rifxe4 24.Bxe7 Fxe7 25.Bxe4 Rixe4 26.Rib6**

**Diagram**
**Støðumynd eftir 26.Rib6**

**26...Fa7!** (Peikar náðileyst ímóti nakna konginum) **27.Rixa8 Rxa8 28.a4** (Besta verja, men nyttuleys í longdini) **28...Bxe2 29.Rc1** (29.Rxe2 Ric3+) **29...Ff2** Kamsky gavst í vónleysari støðu. Topalov í essinum! **0–1**